## Beinta Olsen heldur grækarismessurøðuna í Runavík

Grakarismessuhald verður á økinum sunnan fyri Býráðshúsið í Runavík sunnudagin 15. mars kl. 15. Beinta Olsen, býráðslimur, flytir fram røðu, Nes Sóknar Hornorkestur spælir og skótarnir ganga skrúðgongu. Kaffi og vaflur verður at fáa aftaná, siga tey úr býráðnum í Runavík.



## Grækarismessuhaldið í Havn sunnudagin kl. 15.00

Skótalið Sigmunds Brestissonar skipar fyri Grærismessuhaldið í Havn, har skótarnir saman við borgarum í býnum, bjóða tjóðfugli okkara, Tjaldrinum, vælkomið til land okkara aftur. Allar skótasamskipanir í Havn og á Argjum, fara at ganga skrúgongu og Havnar Hornorkestur spælir. Allir skótar, úlvar, og títtlingar skulu møta í sínum skótahølum klokkan 14. Klokkan 14.45 fer skrúðgongan úr Vágsbotni. Gingið verður eftir Bøgøtu, síðani eftir Tróndargøtu, Niels Finsensgøtu  oman á Vaglið. Sjálvt Grækarismessuhaldið verður á Vaglinum í Havn klokkan 15. Í ár verður tað Kristianna Rein sum fer at halda grækarismessurøðuna. Fyrstu ferð grækarismessan varð hildin, var í 1943. Tað var Sverri Patursson sum heitti á skótarnar um at halda henda dagin.

# Tvey skip á nýggju bedingini



**Stjórin í Mest, Eyðfinn Egholm, sigur, at bedingin á Skála gjørdist nógv dýrari enn upprunaliga mett, men hetta kemst í fyrsta lagi av, at lendisarbeiði úti í sjónum gjørdist nógv meira umfatandi enn væntað. – Gomlu skinnararnir lógu meira at kalla niður á botnin, meðan nýggju skinnararnir, sum eisini ganga heilt út á 17 metra dýpi, liggja á betongi, sigur hann**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin vórðu gomlu ísfiskatrolararnir í Vestmanna, Nornagestur og Kolumbus, tiknir upp á bedingina á Skála. Samstundis er hetta fyrstu skipini, sum eru tikin upp, síðan Mest fekk nýggja beding, ið nú stendur liðug á Skála. Enn er bedingin bara royndarkoyrd, men ikki tikin alment í nýtslu.

Nú skipasmiðjan tók vestmannatrolararnar upp, vórðu samstundis uppmátingar og eftirlit gjørt á bedingini, soleiðis at greiða fæst á, hvussu alt tað nýggja virkar.

Eyðfinnur Egholm, stjóri á Mest, sigur, at tað tók einar 4-5 tímar at taka bæði skipini upp, tí skipasmiðjan eitt nú hevði kavarar niðri, sum fylgdu við, hvussu nýggju vognarnir gingu á nýggju skinnarunum.

### Onkur justering

- Tað gekk rímiliga væl at taka skipini upp, og tað hevði sjálvsagt gingið uppaftur skjótari, um vit ikki skuldu halda eyguni eftir ymsu tættunum í nýggju skipanini, bæði teimum mekanisku og elektrisku. Okkurt smávegis verður at justera, men vit rendu okkum ikki í nakrar stórar trupulleikar á vegnum.

Stjórin í Mest sigur, at skipasmiðjan nú hevur fingið eina nýggja og nútímans beding, sum kann brúkast langt inn í framtíðina. Gamla bedingin var vorðin vánalig, og valið stóð ímillum at pjøssa meira upp á hana – ella at byggja eina nýggja beding.

- Eftirhondini, sum árini eru gingin, og gamla bedingin er vorðin í verri standi, vóru vit heldur ikki ordiliga tryggir við umstøðurnar. Eg vil ikki siga, at vit tóku kjansir, men vit kundu í øllum førum ikki tosa hart um, at vit høvdu eina góða og trygga beding á Skála.

Eyðfinnur Egholm sigur, at tað sjálvandi ongantíð eigur at vera soleiðis, at skipaeigarar ikki skulu tora at koma við skipunum, tí teir ikki eru tryggir við umstøðurnar.

- Nýggja bedingin er fult automatiserað, um vit so kunnu siga. Tað er El-Service, sum hevur staðið fyri stýringunum og elarbeiðnum, og nú kann øll upptøkan og sjósetingin av skipum stýrast frá einum pulti, sigur hann.

Tað er felagið J & K Petersen, sum hevur staðið fyri øllum lendis-og betongarbeiðnum, bæði á landi og úti í sjónum.

### Nógv dýrari

Fyri umleið tveimum árum síðan varð endalig avgerð tikin um, at skipasmiðjan á Skála skuldi hava nýggja beding. Í byrjanini varð mett, at kostnaðurin fór at liggja um einar 15 miljónir krónur, og seinnu metingar søgdu umleið 25 miljónir krónur.

- Tá avgerðin um nýggja beding varð tikin, vistu vit ikki, hvussu nógv fór at vera at gera úti í sjónum, men seinni hevur tað víst seg, at hetta arbeiði gjørdist rættiliga umfatandi. Nýggja bedingin gongur heilt út á 17 metra dýpi, og nú liggja nýggju skinnararnir á betongklintum, sum Eyðfinnur tekur til.

Stjórin ásannar, at arbeiðið, sum upprunaliga varð mett at kosta einar 15 miljónir krónur, kostar út við 40 miljónir krónur, nú nýggja bedingin stendur liðug, men enn ikki er alment tikin í nýtslu.

- Hetta er ein stór íløga, men hon var neyðug, og hetta er samstundis ein



*Nýggja bedingin á Skála er ikki alment tikin í nýtslu enn, men mánadagin varð hon royndarkoyrd, tá teir tóku ísfiskatrolararnar Nornagest og Kolumbus upp*

*Mynd: Mest*